# Úr Løgtinginum



## Nógvar fyrstu viðgerðir

*Fimm fyrstu viðgerðir vóru á skránni fyri tingfundin í gjár*

JOHN JOHANNESSEN

Ein onnur viðgerð, fimm fyrstu viðgerðir, eitt svar uppá fyrispurning og at enda framløga vóru á skránni fyri tingfund nummar 42 hesa tingsetuna, sum varð settur í gjár klokkan hálvgum tvey seinnapartin.

Onnur viðgerðin var av tingmáli nummar 26/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um flyting av veðhaldi fyri lánum hjá Telefonverki Føroya Løgtings. Hetta er uppskot, sum Finnbogi Arge, landsstýrismaður, 3. desember legði fyri tingið vegna landsstýrið.

Næst á skránni var fyrsta viðgerðin av tingmáli nummar 36/1999, ið er uppskot til ríkislógartilmæli um broyting í ríkislógini fyri Føroyar um rættargang. Hetta er uppskot, sum Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna, legði fyri tingið 20. januar í ár.

Onnur fyrsta viðgerðin var av tingmáli nummar 44/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti. Hetta er uppskot, ið Kristian Magnussen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin legði fyri tingið 20. januar í ár.

Triðja fyrsta viðgerðin á skránni var av tingmáli nummar 41/1999, ið er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar við meira. Hetta er uppskot, ið Anfinn Kallsberg, løgmaður, vegna landsstýrið legði fyri løgtingið 21. januar í ár.

Fjóðra fyrsta viðgerðin var av tingmáli nummar 42/1999, ið er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. Hetta er uppskot, ið Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, legði fram vegna landsstýrið 21. januar í ár.

Fimta og seinasta fyrsta viðgerðin á skránni fyri løgtingsfundin í gjár var av tingmáli nummar 43/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skráseting av motrakførum við meira. Uppskotið legði Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, fram vegna landsstýrið 21. januar í ár.

Áðrenn tingfundurin endaði við framløgu, skuldi Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í almanna- og heilsmálum, svara fyrispurningi frá Finni Helmsdal, løgtingsmanni, viðvíkjandi fyribyrging móti tubbaksnýtslu. Fyrispurningurin var nummar 100-12/1999.

## Fundurin fríggjadagin

*Fimm mál vóru á skránni fyri tingfundin seinasta fríggjadag*

JOHN JOHANNESSEN

Tað tók góðar tveir tímar at viðgera tey fimm málini, ið vóru á dagsskránni fyri tingfundin seinasta fríggjadag.

Fyrst á skránni var fyrsta viðgerð av tingmáli nummar 15/1999, ið er uppskot til samtyktar um góðkenning av millumlandasáttmála frá fjóðra apríl 1997 um mannarættindi og lívlæknafrøði. Viðgerðin gekk skjótt fyri seg, og varð málið beint í uttanlandsnevndina.

Næsta málið á dagsskránni var fyrsta viðgerð av tingmáli nummar 39/1999, ið er uppskot til løgtingslóg um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentunum og kommunalan veðhaldsgrunn við meira. Málið varð beint í fíggjarnevndina.

Triðja málið, tingmál nummar 40/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um kommunalan láns- og veðhaldsgrunn við meira, varð viðgjørt saman við tingmáli nummar 39/1999, og varð hetta somuleiðis beint í fíggjarnevndina.

Næstseinast á skránni var val av navnd sambært grein 25 í tingskipanini til viðgerð av tingmáli nummar 27/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um løgtingsins umboðsmann. Nevndin varð sett við formansskapinum umframt einum umboði fyri hvønn flokk. Nevndarlimirnir eru: Finnbogi Ísakson, Eyðun Viderø, Vilhelm Johannesen, Edmund Joensen, Annita á Fríðriksmørk, Rúna Sivertsen, Hans Pauli Strøm, Alfred Olsen, Sámal Petur í Grund og Jenis av Rana.

Seinast á skránni var framløga, og vóru tað málini, ið viðgjørd vórðu á tingfundinum í gjár, ið vórðu løgd fram.

# Peningaliga markið fyri avskriving av smáognum upp

*Landsstýrið skjýtur upp at broyta avskrivingarlógina, so peningaliga markið fyri avskriving av smáognum verður hækkað úr 4.000 kr. ella lægri upp í 20.000 kr. ella lægri*

ÓLAVUR Í BEITI

Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevur vegna landsstýrið lagt fram uppskot at broyta avskrivingarlógina. Í viðmerkingunum sigur løgmaður m. a., at ein bólkur, mannaður við embætisfólki og umboðum fyri vinnuna, situr og arbeiðir við at gera tilmæli um ábøtur á vinnuskattingina, men nú er semja um, at neyðugt er at fremja nakrar broytingar í avskrivingarlógini beinanvegin.



*Anfinn Kallsberg hevur vegna landsstýrið lagt fram uppskot um at broyta avskrivingarlógina*

Og ein broyting er so í avskrivingarlógini, at markið fyri avskriving av smáognum verður hækkað úr 4.000 kr. ella lægri upp í 20.000 kr. ella lægri. Samstundis verður skotið upp viðvíkjandi saldoavskrivingum eftir 1. kapitli, at saldo áðrenn inntøkuársins avskriving upp á 20.000 kr. ella lægri kann avskrivast til fulnar. Eisini verður skotið upp at strika verandi avmarking upp á 50.000 kr. fyri smáognir fyrsta og annað inntøkuárið hjá nýggjum virkjum.

### Myndugleiki flytast

– Fyri at fáa til vega samsvar millum roknskaparligar og skattligar avskrivingarreglur, verður skotið upp at broyta ta sokallaðu kompletterandi regluna, so tann skattskyldugi framyvir er tvungin at fylgja henni og ikki sum higartil, at tað stendur upp til hansara at gera av, um hann brúkar hesa reglu ella ikki.

– Eftir verandi reglum kann landsstýrið, tá heilt serligar umstøður tala fyri tí, leingja freistina fyri javning av negativari saldo. Í verki fylgir landsstýrismaðurin at kalla altíð tilmælinum hjá Toll-og Skattstovuni, tá støða verður tikin til slíkar umsóknir. Fyri at minka um arbeiðsbyrðuna og fyri at stytta avgreiðslutíðina í slíkum málum skjýtur landsstýrið upp, at hesin myndugleiki verður fluttur til Toll- og Skattstovu Føroya.

### Flyting av ognarlutum

Avskrivingarlógin hevur ikki reglur um, hvussu ognir skulu skattast, tá persónar ella feløg, sum hava rikið vinnuligt virksemi, flyta av landinum við slíkum ognum.

– Tá tørvur er á slíkum reglum, skjýtur landsstýrið við hesum nýggjar reglur upp, sum javnseta flyting av ognarlutum til nýtslu uttanlands, sum hava verið nýttir í skattskyldugum virksemi her á landi, við sølu, og at sølupeningurin er handilsvirðið um flutningsmundið, sigur løgmaður í viðmerkingunum.

Og viðvíkjandi fyrisitingarligum avleiðingum, metir løgmaður, at uppskotið verður ikki mett at hava munandi fyrisitingarligar avleiðingar við sær. Broytingarnar koma at ávirka inntøkuskattin nakað. Men væntandi verður nettoskattainntøkan ikki munandi broytt av hesum uppskoti.

# Inntøkan frá sølu av fiskidøgum skattskyldug

*Skotið verður upp, at inntøkan frá sølu av fiskidøgum verður gjørd skattskyldug í øllum førum. Hinvegin kann keyparin útreiðsluføra útveganarpeningin sum rakstrarkostnað útveganarárið*

ÓLAVUR Í BEITI

Fíggjarmálaráðharrin, Karsten Hansen, hevur lagt uppskot fram vegna landsstýrið um ymiskar broytingar skattalógini. Hetta eru partvíst nágreiningar, sum umsiting av reglunum hevur víst verða neyðugar, og partvíst ein fylgja av broytingum av øðrum lógum, sigur fíggjarmálaráðharrin í viðmerkingunum.

Reglurnar um avmarkaða skattskyldu í sambandi við inntøku frá skipi, sum ikki er skrásett í Føroyum, men við ongari manning er leigað av føroyskum reiðaravirki, skulu nú eisini gerðast greiðari.

### Vøra til útflutnings

– Løntakari, sum arbeiðir hjá føroyskum virki, sum framleiðir vørur til útflutnings, fær møguleika fyri at fáa frádrátt fyri meirútreiðslur í sambandi við arbeiði uttanlands. Teir persónar, sum her verður hugsað um, eru slíkir, sum arbeiða hjá framleiðsluvirkjum, har meginparturin av arbeiðinum verður gjørt í Føroyum til útflutnings. Tann parturin av arbeiðinum, sum fer fram uttanlands við m.a. at seta upp tað í Føroyum gjørdu framleiðslu, varir ofta ikki longri enn 2 til 3 vikur.

– Føroysk virki fáa tí nakrar eykaútreiðslur í mun til t. d. danskar fyritøkur, har løntakarin hevur møguleika fyri at fáa frádrátt. Hesin frádráttur kundi verið við til at betra um kappingarføri hjá føroyskum fyritøkum, sum virka vørur til útflutnings.

### Fiskidagar

– Í sambandi við, at fiskidagar eru vorðnir umsetiligir, hevur spurningurin um skatting av søluinntøkuni tikið seg upp. Sum skattalógin er orðað í dag, er høvuðsreglan, at søla av fiskidøgum ikki skal roknast við í skattskyldugu inntøkana. Skotið verður upp, at inntøkan frá sølu av fiskidøgum verður gjørd skattskyldug í øllum førum. Hinvegin kann keyparin útreiðsluføra útveganarpeningin sum rakstrarkostnað útveganarárið, sigur fíggjarmálaráðharrin.



*Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri*

– Fiskidagar verða mettir at vera eitt aktiv, og søla av hesum er skattafrí. Til tess at skatta søluna av fiskidøgum krevst, at skattgjaldarin hevur sum vinnu at selja fiskidagar, ella at hann hevur útvegað sær fiskidagarnar til at selja aftur við vinningi.



# Skipasmiðjan hevur úr at gera

*Á Skála hava teir havt úr at gera síðani hálvan november, men nú er meira vanligt aftur. Kortini er ríkiligt at tríva í hjá teimum áttati monnunum, sum tann næsta mánaðin skulu arbeiða umborð á Kiliutaq, sum er gamli Ango*

SVEINUR TRÓNDARSON

Teir hava havt ríkiligt at tríva í á Skipasmiðjuni á Skála í seinastuni.

Vanliga er nógv virksemi á Skipasmiðjuni um ársskiftið, tí skipini liggja inni allíkavæl. Tí kann tíðin eins væl brúkast skilagott, og tað sæst eisini á ordrabókunum á skipasmiðjunum kring landið.

Jón Danielsen, stjóri á Skipasmiðjuni á Skála letur eisini rímuliga væl at, tá vit hitta hann í telefonini.

– Vit eru nøgdir við gongdina fyri árið í fjør, og eisini at vit hava havt arbeiði til allar teir80 menninar, sum eru knýttir at skipasmiðjuni, sigur hann

Jón leggur afturat, at einu tíðina var so nógv at takast við, at neyðugt var hjá monnunum at arbeiða nógv yvir, og hóast tað var tað ikki nóg mikið.

### Gamli Ango klassast

Hóast tað nú er heldur minni arbeiði á skipasmiðjuni, so er kortini ríkiligt at tríva í tann næsta mánaðin ella so.

Skipasmiðjan á Skála vann í kapping við íslendskar og danskar skipasmiðjur, lisitatiónina upp á klassingina av Kiliutaq, sum er gamli Ango, og tann ordrin hevur við sær, at tað er arbeiði til allar hendur fram til hálvan februar.

Jón Danielsen sigur, at eftir tað er ikki so nógv, sum er, men at tað man fara at koma so hvørt.

– Tað ræður í hvussu er um, at finna arbeiði so at vit kunnu halda allar 80 menninar í arbeiði, tí vit mugu fyri alt í verðini ikki missa burturav fólkinum. Tað er so torført at fáa teir aftur, sigur hann

Arbeiðið upp á Kiliutaq fer sum sagt at taka umleið ein mánað, og tá tað er liðugt er motorurin høvuðsumvældur, aksil, róður, verksmiðja og frystarí eisini høvuðsumvælt.

### Bjóða uttanlands

Sum sagt, so fekk Skipasmiðjan ordran fyri nøsini á donskum og íslendskum skipasmiðjum.

Vit spurdu tí Jón, um teir vanliga bjóða upp á útlendskar uppgávur.

– Ja, vit royna. Vit hava givið tilboð upp á eini tríggjar íslendsk skip, men tey eru torfør at fáa hendavegin, tí kappingin er sera hørð.



*Tað er aftur rættuligt lív í skipasmiðjuni á Skála. Sambært Vinnuhúsinum, so nógv lív, at skálafólk eru á einum fimtaplássi tá tað um yvirskot pr. íbúgva umræður*

**savnsmynd**

Hann sigur, at teir í ávísum førum hava kappast við spanskar, litaviskar og polskar skipasmiðjur, og hann leggur afturat, at tá er torført at fáa ordran.

– Lønarlagið í teimum londunum er so nógv lægri enn okkara og tað ger, at teir kunnu bjóða lægri.

Men hóast tað, so hevur skipasmiðjan ikki altíð verið í tí dýrara endanum.

– Í onkrum føri hava polakkar boðið hægri enn vit, og vit eru tann bíligasta norðurlendska skipasmiðjan, sigur Jón

### Sandoyarferjan áveg

Sum kunnugt skal nýggja Sandoyarferjan gerast inni á Skála.

Arbeiði at gera skrokkin verður gjørt á polskari skipasmiðju og skal vera liðugt um 20. apríl, sigur Jón Danielsen.

– So kemur túrurin til okkara, sigur Jón Danielsen.

Skipasmiðjan á Skála skal gera restina av arbeiðinum til Sandoyarferjan er klár at handa Strandferðsluni um ársskiftið ´00-´01.

Hetta var góður ordri at fáa hjá Skipasmiðjuni á Skála, sum sostatt fer at lata fyrsta nýbygningin av hondum í nógv harrans ár.

# Kirkjugarðurin á Skála útbyggjast

*Kirkjugarðurin á Skála er um at vera fullur og tí er neyðugt at útbyggja hann. Bygdaráðið er farið undir at fyrireika útbyggingina, sum eftir ætlan skal vera liðug tá summarið er av*

SVEINUR TRÓNDARSON

Um ikki so langa tíð, verður arbeiði at vaksa um kirkjugarðin á Skála boðið út, og eftir ætlan skal tað vera liðugt, tá summarið er av.

Hetta sigur Símun Pauli Berg, bygdarráðsformaður á Skála.

Fleiri hava havt á orði, at kirkjugarðurin fór at fyllast heilt skjótt var ikki okkurt munagott gjørt, og tað hevur bygdaráðið eisini staðfest.



*Kirkjugarðurin á Skála er farin at fyllast, men loysn er á veg. Hann verður útbygdur suðureftir* **savnsmynd**

– Vit hava havt ætlanir um at fara undir arbeiði í eina tíð, men hava av fíggjarligum ávum valt at bíða. Nú eru vit so farin undir arbeiði og tað skal eftir ætlan vera liðugt í summar, sigur bygdaráðsformaðurin, sum enn ikki veit, hvussu nógv tað fer at kosta.

Útbyggingin av kirkjugarðinum á Skála verður gjørd á tann hátt, at verandi garður verður longdur í beinari linju úteftir. Økið er keypt, men í fyrsta umfari verður ikki alt brúkt.

– Vit longja hann fimtan metrar í fyrsta umfari, og tað skuldi verið nóg mikið í eina rúma tíð.

Vanliga verður sagt, at ein kirkjugarður skal liggja í eitt ár ella tvey fyri at moldin fær tíð at seta seg, men um tað fer at bera til á Skála er ikki vist.

– Tað eru bert fá pláss eftir í verandi garði, m. a. av tí, at fleiri pláss eru bíløgd. Men vit vóna at tað fer at bera til at bíða eitt ár kortini, sigur Símun Pauli Berg

## Andersen - ikki Hansen

Í greinini um politihundin Pedro í blaðnum leygardagin hevur hundaførarin fingið skeivt eftirnavn. Rætta eftirnavnið er Andersen og ikki Hansen, sum skrivað stóð. Vit biðaja Carsten Andersen og lesararnar halda okkum til góðar.

Blaðm.





Til leigu

Bygningurin í Vágsbotni THE HOUSE OF LEI er til leigu við ella uttan handil um hóskandi boð fæst

Spf. Jensen • Tel. 31 47 40

Sosialurin - 311820